## Aftur stórtap til Frem

Frem var í gjár á vitjan í Roskilde, og gjørdist talan um ein 4-1 sigur til Roskilde. Støðan í hálvleikinum var 2-1 til Roskilde. Casper Grønn Larsen skoraði málið hjá Frem. Jeppe Kjær gjørdist stóra hetjan hjá Roskilde í dag. Hann skeyt eitt reint hattrick. Talan er um triðja stórtapið á rað hjá Frem. Í seinastu viku tapti Frem 0-3 ímóti AB, og næstsíðsta vikuskiftið tapti Frem 0-3 ímóti Herfølge. Frem liggur sum nummar 12 í næstbestu donsku fótbóltsdeildini við 28 stigum fyri 23 dystir.



## Ancelotti til Chelsea

Sambært italska Gazzetta dello Sport verður Carlo Ancelotti tann 30. mai settur í starv sum nýggjur venjari hjá Chelsea. Ancelotti er í løtuni venjari hjá Milan, og sambært blaðnum er semja gjørd um, at italska ligan skal spælast liðugt, áðrenn nakað verður almannakunngjørt. Carlo Ancelotti, sum sjálvur spældi við Milan sum spælari, hevur verið venjari hjá Milan í sjey ár.

# Manchester United endurvann meistara-heitið




*Fyri 18. ferð er Manchester United enskur meistari. Talið er serstakt, tí við hesum er Liverpool ikki longur einsamalt á listanum yvir mest vinnandi liðini í enskari fótbóltssøgu*

*Mynd: Polfoto/AP*

**Manchester United og Liverpool hava nú vunnið 18 meistaraheiti í part**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Í einum ógvuliga keðiligum dysti á heimavølli ímóti Arsenal á Old Trafford leikvøllinum í Manchester leygardagin, eydnaðist tað Manchester United at vinna sítt triðja meistaraheiti á rað, og sítt átjanda meistaraheiti í alt.

Í mong ár hevur stóra viðhaldsfjøldin hjá Manchester United tráað eftir at javna talið av meistaraheitum hjá Liverpool. Tískil var frøin ovurstór, tá dysturin millum Manchester United og Arsenal var liðugur. Máltalvan vísti 0-0, og við sjey stigum frammanfyri Liverpool, var alt avgjørt.

Dysturin var einki verdur sum undirhald, og um nakar fer at minnast henda dagin á Old Trafford, so verður tað fyri steypahandina aftaná dystin, har heimafjøldin kundi fegnast um, at meistaraheiti var vunnið á heimavølli. Síðani 1993 hevur tað bara hent tvær ferðir út av 11, at Manchester United hevur vunnið meistaraheitið í einum heimadysti á Old Trafford.

### Harða kappingin

Eingin ivi er um, at Manchester United og Liverpool eru tey nógv best umtóktu ensku liðini, bæði í Onglandi og kring heimin.

Í 1992 hevði Liverpool 18 meistaraheiti, og Manchester United hevði sjey. Tí hevði tað sera stóran týdning fyri Liverpool-viðhaldsfólk at steðga sigursgongdini hjá Manchester United, fyri at kunna vera mest vinnandi liðið í Onglandi. Liverpool gav eisini Manchester United ein skarpan gang hetta kappingarárið, og vann Liverpool báðar dystirnar ímóti Manchester United í hesum kappingarárinum. 2-1 á Anfield Road og 4-1 á Old Trafford.

Liverpool mundi fingið United úr fatninginum, aftaná 4-1 sigurin á útivølli. United tapti 2-0 ímóti Fulham beint aftaná, og tá tevjaði Liverpool blóð.

United kom fyri seg aftur við einum 3-2 sigri á heimavølli ímóti Aston Villa, tá tann blaðungi Federicio Maceda skeyt eitt sigursmál, sum heimafjøldin seint fer at gloyma. United byrjaði tá aftur at vinna sínar dystir, men Liverpool hevur pressað United við at vinna sínar dystir. Men leygardagin var seinasti møguleikin hjá Liverpool rokin.

Liðini eru jøvn í meistaraheitum, men Liverpool hevur enn betri hagtøl, tá tað kemur til at vinna europeisku meistarakappingina, Champions League. Liverpool hevur vunnið kappingina fimm ferðir, meðan United hevur vunnið kappingina tríggjar ferðir.

United fær tó høvið at vinna Champions League á fjórða sinni, tá teir spæla finalu ímóti FC Barcelona á olympiska leikvøllinum í Róm, mikukvøldið 27. mai. Tá talan er um sigrar í FA Cup steypakappingini, er talan um 11 sigrar til United, og sjey sigrar til Liverpool. Liverpool hevur hinvegin vunnið Liga Cup kappingina sjey ferðir, meðan United bert hevur vunnið ta kappingina tríggjar ferðir.

### Ferguson og Giggs

Ein skoti og ein walisi eru ímyndin av avrikslistanum hjá Manchester United, báðumegin aldarskiftið. Seinasta meistaraheitið, er nummar 11 hjá venjaranum, Sir Alex Ferguson, og somuleiðis meistaraheiti nummar 11 hjá Ryan Giggs.

United hevði ikki meir enn fingið steypið í hondina, so meldaði Alex Ferguson út, at hann ætlar at vinna tað fjórða meistaraheiti á rað. Tað hevur einki enskt lið gjørt í søguni. Manchester United, Liverpool, Arsenal og Huddersfield eru einastu feløgini, sum hava vunnið meistaraheiti tríggjar ferðir á rað.

35 ára gamli Ryan Giggs tekur enn eitt tørn fyri Manchester United. Gamli vongurin er vorðin umskúlaður til at spæla meir sentralt, og sigast má, at waliski bóltsnillingurin, sum vitjaði Føroyar við walisiska landsliðnum afturi í 1993, hevur fingið sín annan ungdóm, sum fótbóltspælari. Giggs eigur nú eisini metið, sum spælarin sum hevur spælt flest dystir fyri Manchester United. Starvsfelagarnir í ensku liguni valdu eisini Ryan Giggs til ársins spælara. Mong tulkaðu tað, sum eitt herðaklapp fyri eina ótrúliga yrkisleið.

Nú bíðar Champions League finalan ímóti Barcelona, og sjálvt um United hevur vunnið bæði Premier League, Liga Cup og HM fyri felagslið, so verður Sir Alex Ferguson ikki nøgdur, um ikki europeiska meistaraheiti eisini kemur í hús. Skotin er harður og rættvísur, men eisini krevjandi. Sir Alex hevur nú vunnið 33 heiti við United, sum er eitt met, ið neyvan verður tikið.

### Premier League, úrslit

Leygardagin
Manchester United-Arsenal 0-0
Middlesbrough-Aston Villa 1-1
Newcastle-Fulham 0-1
Stoke City-Wigan 2-0
Tottenham-Manchester City 2-1
Bolton-Hull 1-1
Everton-West Ham 3-1

Sunnudagin
WBA-Liverpool 0-2
Chelsea-Blackburn 2-0

Mánadagin
Portsmouth-Sunderland

**Premier League**

| | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 Man Utd | 37 | 27 | - | 6 | - | 4 | 67 | 24 | 43 | 87 |
| 2 Liverpool | 37 | 24 | - | 11 | - | 2 | 74 | 26 | 48 | 83 |
| 3 Chelsea | 37 | 24 | - | 8 | - | 5 | 65 | 22 | 43 | 80 |
| 4 Arsenal | 37 | 19 | - | 12 | - | 6 | 64 | 36 | 28 | 69 |
| 5 Everton | 37 | 16 | - | 12 | - | 9 | 53 | 37 | 16 | 60 |
| 6 Aston Villa | 37 | 16 | - | 11 | - | 10 | 53 | 48 | 5 | 59 |
| 7 Fulham | 37 | 14 | - | 11 | - | 12 | 39 | 32 | 7 | 53 |
| 8 Tottenham | 37 | 14 | - | 9 | - | 14 | 44 | 42 | 2 | 51 |
| 9 West Ham | 37 | 13 | - | 9 | - | 15 | 40 | 44 | -4 | 48 |
| 10 Man City | 37 | 14 | - | 5 | - | 18 | 57 | 50 | 7 | 47 |
| 11 Stoke | 37 | 12 | - | 9 | - | 16 | 37 | 51 | -14 | 45 |
| 12 Wigan | 37 | 11 | - | 9 | - | 17 | 33 | 45 | -12 | 42 |
| 13 Bolton | 37 | 11 | - | 8 | - | 18 | 41 | 52 | -11 | 41 |
| 14 Blackburn | 37 | 10 | - | 10 | - | 17 | 40 | 60 | -20 | 40 |
| 15 Portsmouth | 36 | 9 | - | 11 | - | 16 | 35 | 55 | -20 | 38 |
| 16 Sunderland | 36 | 9 | - | 9 | - | 18 | 31 | 48 | -17 | 36 |
| 17 Hull | 37 | 8 | - | 11 | - | 18 | 39 | 63 | -24 | 35 |
| 18 Newcastle | 37 | 7 | - | 13 | - | 17 | 40 | 58 | -18 | 34 |
| 19 Middlesbr. | 37 | 7 | - | 11 | - | 19 | 27 | 55 | -28 | 32 |
| 20 WBA | 37 | 8 | - | 7 | - | 22 | 36 | 67 | -31 | 31 |

## Seinasta vónin hjá WBA brast

**West Bromwich má enn ein túr niður í næstbestu deildina**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tað var tvingandi neyðugt hjá Birmingham-liðnum, West Bromwich Albion at vinna á Liverpool á heimavølli ígjár, fyri at kunna halda lív í seinastu vónini, fyri at yvirliva í Premier League. Men dýr mistøk í verjuni forkomu møguleikanum.

West Bromwich byrjaði annars dystin væl, men tá ein hálvur tími var farin av dystinum, byrjaði at ganga galið hjá West Bromwich. Í einari støðu, sum tyktist vandaleys megnaði West Bromwich-verjuspælarin, Shelton Martis at spæla sær av við bóltin. Steven Gerrard var sum ein heykur yvir honum. Liðskiparin hjá Liverpool setti beina kós ímóti málinum, og hann skoraði hegnisliga við at lobba bóltin upp um málverjan hjá West Bromwich og í mál til 1-0.

### Kenna túrin

Tá ein góður tími var farin av dystinum slapp Dirk Kuyt rættiliga ótarnaður at koma sær í eina góða støðu, har hann meddaði til, so bólturin sat í málinum við nærmastu stongina.

Heimaliðið megnaði ikki at koma aftur í dystin, og má West Bromwich enn ein túr niður í næstbestu deildina.

Liðið úr The Midlands kennir túrin. Liðið flutti upp úr næstbestu deildini í fjør, og hava teir roynt túrin nakrar ferðir. Tríggjar ferðir í hesi øldini, er liðið sent niður aftur í næstbestu deildina The Championship. Liðið flutti upp í Premier League, bæði í 2002 og í 2004.